gult14 cyan14 magenta14 svart14

VB verður á jørðini

Venjarin hjá meistaraliðnum staðfestir, at tað er alneyðugt hjá hansara monnum framvegis at hava rætta hugburðin. Um hann ikki verður til staðar, so kiksar tað skjótt

Tað fer at styrkja nógv um B68 liðið, um Súni Fríði verður klárur

Meistaraliðið úr Vági fer í morgin á Svangaskarð. Kenslan av at tapa í landskappingini man kennast langt burtur hjá VBarunum. Í trettanda umfarinum í fjør vóru teir í Runavík, og NSÍ vann 4–0. Síðani hevur VB ikki tapt í landskappingini. Í fjør vóru teir á grasvøllinum á Toftum hvítusunnuaftan, og tá fóru teir við øllum stigunum.

– Vit hava stóra virðing fyri B68, men vit fara aftur hesa ferð eftir øllum stigunum.

Hetta sigur VB venjarin, Krzystof Popczynski. Hann heldur ikki, at VB er favorittur í morgin:

– Vit hava ein møguleika at vinna. Men so skulu allir spælararnir vera eyðmjúkir yvirfyri uppgávuni. Um vit fara á vøllin og hugsa, at vit eru meistarar, og at hetta fer at ganga, so fer tað ikki at ganga væl. Vit mugu – akkurát sum í fjør – stríðast og arbeiða alla tíðina.

Allir spælararnir hjá VB eru tøkir, og venjarin heldur seg hava breiðari hóp hesa ferð, enn hann hevði í fjør.

Vit hava fleiri spælarar, ið hava støði til bestu deildina. Tað hevur stóran týdning, at vit hava fingið Marek, sum er ein skilagóður spælari. Men eg vildi havt ynskt, at vit eisini høvdu Milan Kulic. Tíverri er hann ikki í Vági í ár. Um vit høvdu hann, so høvdu vit ivaleyst størstu breiddina á miðvøllinum av øllum feløgunum í 1.deild, heldur VB venjarin.

Marcello bíðar

Á Toftum skulu teir royna at koma afturíaftur, eftir tapið í Gundadali ímóti HB. Eftir tann dystin varð sagt, at B68 leið undir, at báðir skrapræddararnir frá í fjør, Súni Fríði Johannesen og Marcello Marcellino, ikki vóru við.

Súni Fríði Johannesen hevur vant í vikuni, og hann verður við í hópinum. Sjálvandi er hann ikki í fullgóðari venjing, tí hann hevur verið burtur frá í fleiri vikur. Marcello Marcellino er framvegis skaddur í knænum. Hinir B68 menninir eru allir tøkir í morgin.

Spurningurin er so, hvussu Jóannes Jakobsen velur at blanda kortini hesa ferð.

jh

FSV vaskar talvuna

Vágemenn ætla sær at byrja av nýggjum, tá NSÍ í morgin kemur til Miðvágs. Men í FS Vágum eru teir framvegis skerdir av skaðum

Tað verður spennandi, um FS Vágar klárar at reisa seg eftir stórtapið í Vági

Tá teir í NSÍ minnast aftur á kappingarárið í fjør, so er ein av kiksarunum, ið teimum rennur í huga, útidysturin í Vágum. Í Sørvági endaði tað 3–3, og harvið vóru lunnar lagdir undir eitt soltið tíðarskeið, sum ikki endaði fyrrenn NSÍ vann 6–0 í Sumba.

Dysturin í Vágum varð spældur í øðrum umfari. Aftur hesa ferð skal NSÍ vestur í Vágar í øðrum umfarinum, og um NSÍ skal vera uppií, har tað verður hugaligt at kappast, so mugu teir fáa øll stigini í Miðvági.

Hóast FS Vágar tóktist illa fyri, tá teir taptu 6–0 í Vági, so verður tað neyvan soleiðis, at stigini so at siga koma av sær sjálvum til Runavíkar.

– At FSV tapti 6–0 ímóti VB eigur ikki at hava við sær, at vit taka fyri givið, at vit vinna dystin. Men vit mugu fara vestur fyri at vinna, sigur Gert Langgaard við heimasíðuna hjá NSÍ.

Eftir hvat vit hava frætt, so eru allir spælararnir hjá NSÍ tøkir.

Fleiri skaðar

Verri stendur til í Vágum. Har eru tríggir av teimum, sum spældu nógv í fjør, ikki tøkir í morgin. Teir eru John Johansen, sum skal hava beini í gipsi í tríggjar mánaðir, Jack Johansen, sum hevur trupulleikar við knænum, og so Birgir Joensen. Hann hevur vant eitt sindur í vikuni, men tað verður ikki roknað við, at hann verður førur fyri at spæla. Tað er lærkrikin, sum er trupulleikin.

Fyrsti setningurin hjá vágamonnum verður at tetta í verjuni. Hóast tennissekkin í fyrsta umfarinum, so hava teir ikki heilt mist mótið:

– Tað var ikki gott hjá okkum í Vági, so vit mugu byrja av nýggjum. Men eg rokni við, at vit verða ikki teir einastu, ið fara at tapa á útivølli ímóti VB, staðfestir Tór–Ingar Akselsen, sum var ætlaður at hava framrættaðan leiklut í høgru ímóti VB, men sum orsaka av stóra trýstinum so at siga ongantíð fekk møguleikan at fara frameftir.

jh

GÍ-EB/Streymur

Tungt hjá uppflytarunum

Í Gøtu ætla teir at halda fast um góðu byrjanina, sum teir fingu fyri viku síðani í Klaksvík

UPPTAKT
Jákup Mørk

Á heimavølli skal mann hava ein sigur, sigur Bartal Eliasen hjá GÍ

Hóast mong nærum høvdu avskrivað GÍ, longu áðrenn kappingin var byrjað, tykist hetta ikki at nerva skurðarnar á nakran hátt. Byrjanin upp á árið hevur verið góð, og einki er at ivast í, at GÍ ætlar at halda fast um hetta, tá teir sunnudagin taka móti uppflytarunum.

– Á heimavølli skal mann hava ein sigur. Annars kanst tú ikki vera við í oddinum, sigur Bartal Eliasen bersøgin, tá vit spyrja hann um vónirnar til dystin.

Bartal hevur annars ligið sjúkur alla hesa vikuna, men sjálvur roknar hann við at verða tøkur sunnudagin. Tað verða Magni Jarnskor og Óli Hansen helst eisini, so alt í alt eru líkindi fyri, at tað verður eitt GÍ lið í sterkastu uppstilling, sum fer á vøllin sunnudagin.

Mugu stríðast

Alfred Jacobsen, sum er liðformaður hjá EB/Streymi, sigur undan dystinum, at hann so avgjørt roknar við eini torførari uppgávu í Serpisgerði sunnudagin.

– Tað er einki at ivast í tí, men vit mugu í øllum førum royna okkara besta. Megna vit at halda teimum frá at skora, kann alt henda, so tað er at vóna tað besta, sigur hann.

Hann sigur annars, at tað verður á leið sama fólkið til dystin, sum teir høvdu við á Sandi seinast. Undantakið er Jákup Martin Joensen, sum helst ikki fær komið av Flatlondum hetta vikuskiftið. Hinvegin verður Eyðfinn Joensen møguliga tøkur eftir knæskaðan, sum hann hevur drigist við, men hetta var heldur ivasamt, tá vit frættu seinast.

Hvussu er og ikki, so er einki at ivast í, at gøtumenn eru favorittar undan dystinum, men sum kunnugt skal hesin spælast, áðrenn stigini fara annan ella annan vegin.

gult15 cyan15 magenta15 svart15

Vikuskifti

Nr. 86 • leygardagur • 5. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Rockur on the rocks

So einfalt tekur Jyllandsposturin saman um Prix Føroyar finaluna, sum tó verður viðgjørd í tveimum greinum.

Lesið á síðu 3

Føroya elsti fótbóltspælari:

Hugurin drívur verkið

Hóast Majbritt úr Hørg í Sumba er fylt 50 ár, hevur hon ongar ætlanir um at halda uppat at spæla fótbólt. Hon hevur spælt á sama liðið sum dótturin í nógv ár og skemtar við, at hon vónar eisini at sleppa at spæla onkran dyst saman við ommudóttrini

Lesið á síðu 4-5

Hotel Tórshavn:

Ein føroyskur blettur í Keypmannahavn

Lesið á síðu 8

Gloymdu ikki ættarbandið

Jukim Olsen, sum er svínoyingur og búsitandi í Havnini, hugleiðir í sambandi við eitt gullbrúdleyp og ein 80 ára føðingardag um Svínoy og umstøðurnar hjá svínoyingum fyrrapartin av farnu øld

Lesið á síðu 9-10-11

Hví hjálpti eingin mær, tá ið eg var lítil

- Síðani eg var fimm ára gomul, havi eg hugsað um at dripið meg sjálva. Tíðliga og seint hevur mamma trúttað niður meg, at eg eri eitt haft um beinið, og at eg aldri skuldi verið fødd. Hví skuldi eg liva, tá ið hon ikki vildi hava meg. Samstundis eri eg bangin fyri at doyggja og bangin fyri at liva, sigur Julia, ið er ung kvinna av bygd, sum hvønn dag stríðist við avleiðingarnar av vantandi umsorgan, kynsliga misnýtslu, rædsluherðindum og øðrum.

Lesið á síðu 6-7